Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 25.01.2024 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Katrin Kjartansdóttir
Magnus Skoralíð
Marjun Andreasardóttir
Rúni Justinussen
Marita Klein Joensen
Petur Súni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari: Erik Lervig

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 1/24 | 24/00061-14 | Umsókn um at keypa part av lendi matr. nr. 128d í Leirvík | 3 |
| 2/24 | 24/00111-2 | Marknaumskipan - Matr. nr. 339ap og 339a LV | 4 |
| 3/24 | 24/00112-2 | Sundurbýti av matr. nr. 339a til grundøkir og veg | 5 |
| 4/24 | 24/00128-2 | Serstøkt byggisamtykt fyri matr. nr. 169 á Havnalagnum í Leirvík við Lugarið | 6 |
| 5/24 | 24/00034-3 | Høll til padel og squash | 8 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 1/24 Umsókn um at keypa part av lendi matr. nr. 128d í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.01.2024 | 2/24 | 24/00061-14 |
| 2 Býráðið | 25.01.2024 | 1/24 | 24/00061-14 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánarin av matrikul 174 í Leirvík hevur sent umsókn til Eysturkommunu dagfest 8. nov. 2023, um at keypa umleið 50 fermetrar av matrikul nr. 128d í Leirvík.<br><br>Hjallurin tilhoyrandi ognin liggur uttan fyri markið á matrikul 174.<br><br>**Ískoyti:**<br>Eysturkommuna hevur móttikið áheitan frá matrikkulstovuni um at sethús á matr. nr. 213 og parkeringsøki á matr.128d í Leirvík, eru á hvør sínari byggisamtykt. Matr.nr. 128 d liggur á øki E – Almennir Stovnar og matr.nr 213 liggur á øki A - Miðstatarendamál. Fyri at kunna fremja hesa sundurbýting, er neyðugt við frávik, soleiðis at samtykta sundurbýta fer frá øki E og til øki A í byggisamtyktini. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at selja 50 fermetrar av matrikul 128d og at leggja hesar saman við matrikul nr. 174 í Leirvík.<br>Hetta er samtykt á býráðsfundi í august 2023<br><br>**Ískoyti til tilmæli:**<br>Mælt verður til, at loyva frávikunum at sundurbýtið kann fremjast. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. januar 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 25. januar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 2/24 Marknaumskipan - Matr. nr. 339ap og 339a LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.01.2024 | 3/24 | 24/00111-2 |
| 2 Býráðið | 25.01.2024 | 2/24 | 24/00111-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Fyri at fáa pláss fyri parkeringsplássum og góða atkomu til íbúðirnar sum Norðhús skal byggja, er neyðuga leggja 324 fermetrar afturat matrikul nr. 339ap.<br><br>Mælt verður til at marknaðarumskipa matr nr. 339ap og 339a í Leirvík. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at taka undir við tilmælinum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. januar 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 25. januar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipananevndini

## 3/24 Sundurbýti av matr. nr. 339a til grundøkir og veg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.01.2024 | 4/24 | 24/00112-2 |
| 2 Býráðið | 25.01.2024 | 3/24 | 24/00112-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í samband við at útstykkingina í Fløtugerði í Leirvík, er neyðugt at fremja niðanfyristandandi sundurbýti.<br><br>Matrikkulin 339a er samanlagt 21.988 m2.<br><br>Neyðugt er at gera fylgjandi:<br>• Íbúðarøki sundurbýtast til áleið 1472 m2<br>• Vegurin sundurbýtast til áleið 601 m2<br>• Íbúðarøki  sundurbýtast til á leið 1.424 m2 |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at gera sundurbýtið. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. januar 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 25. januar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 4/24 Serstøkt byggisamtykt fyri matr. nr. 169 á Havnalagnum í Leirvík við Lugarið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.12.2023 | 19/23 | 24/00128-2 |
| 2 Vinnunevndin | 17.01.2024 | 2/24 | 24/00128-2 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.01.2024 | 5/24 | 24/00128-2 |
| 4 Býráðið | 25.01.2024 | 4/24 | 24/00128-2 |

**Málslýsing:**

Serstøk byggisamtykt er gjørd fyri havnaøkið við Lugarið matr. nr. 169a í Leirvík. Økið liggur í einum C2 økið. Umsitingin hevur arbeitt við at gera eina serstaka byggisamtykt, ið hóskar til umhvørvið.
Í stuttum, so inniheldur serstaka byggisamtyktin møguleikar til bygging av bústøðum og annað útatvent virksemi í niðari hæddini, so sum kafé, handil o.a., umframt hæddarviðurskifti, frástøðu til mark (byggilinjur) v.m.

Víst verður til skjøl í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at samtykkja serstøku byggisamtyktini fyri havnaøkið við Lugarið matr. nr. 169a í Leirvík.

**Vinnunevndin 17. januar 2024**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini við tí broyting, at §3 stk. 1 verður bústovnur og bústaður tikið burtur, og møguleiki kann verða at innrætta báðar hæddir.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. januar 2024**
Petur Súni Jacobsen og Magnus Skoralíð taka undir við tilmælinum hjá Vinnunevndini.

Marjun Andreasardóttir tekur støðu á býráðsfundinum.

**<u>Býráðið 25. januar 2024</u>**
Málið beint aftur í nevnd til viðgerðar.

## 5/24 Høll til padel og squash

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.12.2023 | 18/23 | 24/00034-3 |
| 2 Vinnunevndin | 17.01.2024 | 1/24 | 24/00034-3 |
| 3 Býráðið | 25.01.2024 | 5/24 | 24/00034-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost, um øki á matrikul nr. 169a í Havnalagnum við Lugarið í Leirvík.<br><br>Ætlanin er, at gera eina høll til padel og squash. Tvey uppskot til staðseting av høllini eru við, sí viðfestu tekningar.<br><br>Mælt verður til, at geva tilsøgn til økið á matrikul nr. 169a í havnalagnum við Lugarið í Leirvík í 6 mánaðir, og at staðsetingin verður skipa soleiðis, at langsíðan á høllini fylgir keiini. Umframt at høllin verður tillaga, so hon liggur innan fyri vísta øki á tekningini. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

Ongar

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við tilmælinum og geva tilsøgn til øki í 6 mánaðir. |

### Vinnunevndin 17. januar 2024
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

### Býráðið 25. januar 2024
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini

fundurin lokin kl. 19.00

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen